

Henrik Appel er aðalskrivari hjá Bryd Tavsheden, ið arbeiðir við dulnevndari ráðgeving til børn og ung ið eru fyri harðskapi. Hann hevur 10 ára royndir sum leiðari í Tuba, sum bjóðar ráðgeving í smb. við rúsdrekka - ella rúsevnismisnýtslu. Hann kemur at tosa um ymisk sløg av harðskapi við útgangsstøði í stuttfilmum, hann hevur gjørt um evnið.



Hedvig Johansdóttir, aðalskrivari í Barnabata, greiðir frá, hvussu nógv børn og ung hava ringt og skrivað til 116 111 Tú & Eg Ráðgevingina í 2025 og 2026, og hvørji evni fylla mest.



Anna Dam, løgfrøðingur á Barnaverndarstovu Føroya, fer at greiða frá um fakliga og lógarbundna ábyrgd - herundir skerpaða fráboðanarskyldu hjá ráðgevum, sum arbeiða við børnum og ungum, sum stríðast.



Trygvi í Liða er sálarfrøðingur í Títt Rúm hjá Bláa Krossi Føroya og arbeiðir við børnum, ungum og familjum.
Hann fer at seta orð á, nær ráðgeving er nøktandi í samrøðum við ung, sum stríðast sálarliga, og hvussu ráðgevar kunnu handfara ábyrgd, óvissu og egnar kenslur í hesum sambandi.



Synnøve av Rana, verkætlanarleiðari á Barnaverkætlanini, greiðir frá, hvat børn og ung ynskja og leingjast eftir í mun til trivnað og eitt gott lív útfrá úrslitunum í stóru Barnaverkætlanini.



Tóra Petersen, sálarfrøðingur og stjóri á Sernámi, greiðir frá kanningum um børn og ung í Føroyum, sum hava upplivað harðskap í nærsambondum og kanningum av seinárin av einum lívi í harðskapi í nærsambondum.